# Offur frá Vietnamkríg

**Hóast tað fer at nærkast 40 árum, síðani kríggið í Vietnam endaði, er tann seinasti kapittulin í søguni frá krígnum ikki skrivaður enn. Seinasta fríggjadag endaði ein kapittul, tá ein dómstólur í New York havnaði einum kravi frá nøkrum vietnamesarum, sum vóru offur fyri tí sokallaða „Agent Orange" - eitt eitrandi, plantudrepandi evni, sum amerikonsk flogfør sprændu oman yvir stór øki í Vietnam í árunum frá 1961 til 1971**



24 ára gamla Le Thi Nhon (høgrumegin) og 15 ára gamla systirin Le Thi Hoa líða báðar av avleiðingunum av „Agent Orange", tí for

## Krígsoffur



**Árni Joensen**
arni@sosialurin.fo

Offrini vilja vera við, at amerikanararnir gjørdu seg sekar í krígsbrotsverki, tá teir sprændu eiturevnið oman fyri frumskógirnar fyri at reka Vietcong-hermenninar burtur haðani. Men hesum var dómstólurin í New York ikki samdur við teimum í, og hansara niðurstøða ger, at tey raktu kunnu ikki krevja endurgjald frá teimum umleið 30 fyritøkunum, sum gjørdu tað plantudrepandi eiturevnið.

Sakførararnir hjá teimum vietnamesisku offrunum halda uppá, at at plantueiturevnið, ið eisini er kent undir navninum dioxin, hevur elvt til krabbamein og misvøkstur av ymiskum slagi, og ein sannroynd er tað eisini, at í Vietnam verða óvanliga nógv børn fødd við misvøkstri.

### 68 mió. litrar

Millum teirra, sum eru fødd við álvarssomum misvøkstri,m er Nguyen Xuan Minh, sum bleiv avmyndaður á Tu Du-sjúkrahúsinum í Ho Chi Minh-býnum í Vietnam fyri trimum árum síðani. Hann líkist ikki øðrum fólki, tí høvdið ikki tað skap, sum mannahøvur vanliga hevur.

Amerikonsku myndugleikarnir og sakførararnir hjá verksmiðjunum, sum gjørdu plantueiturið, sum bleiv sprænt út yvir frumskógirnar í Vietnam, siga, at átakið varð ikki sett í verk við ringari meining, sum teir orða tað.

Umleið 68 milliónir litrar av „Agent Orange" vórðu sprændir út yvir Vietnam tey tíggju árini, amerikanararnir brúktu hetta slagið av krígsførslu.

### Til Hægstarætt

Fyri trimum árum síðani kom ein dómari í Brooklyn til ta niðurstøðu, at tað at brúka plantudrepandi evni í krígstíð er ikki tað sama sum eiturspræning. Sami dómari vildi vera við, at tað finnast eingi sannførandi prógv fyri, at tað plantudrepandi evnið frá amerikonsku flogførunum hevur nakað beinleiðis samband við teir skaðar, sum fyrrverandi amerikanskir hermenn og sivilfólk í Vietnam hava fingið síðani.

Hendan dómin skutu sakførararnir hjá teimum vietnamesisku offrunum inn fyri ein kærudómstól í New York, og tað var hann, sum seinasta fríggjadag staðfesti tann fyrra dómin. Sakførararnir hjá offrunum vilja vera við, at næstan tríggjar milliónir fólk í Vietnam líða av sjúkum og misvøkstri, ið uttan iva standast av tí plantudrepandi evninum. Jonathan Moore, sum er ein av sakførarunum hjá offrunum, sigur við Reuters, at hann er sera vónsvikin av úrskurðinum hjá kærudómstólinum í New York.

- Eydnast tað ikki at fáa Hægstarætt at broyta hesa niðurstøðuna, er hetta tað seinasta rættarmálið, ið hevur við „Agent Orange" at gera, sigur Jonathan Moore.

### Verksmiðjurnar nøgdar

Skuldi tað hent, at amerikanski hægstirættur gevur saksøkjarunum viðhald, kunnu verksmiðjurnar, sum gjørdi tað plantudrepandi evnið, vænta sær fleiri milliardir krónur í endurgjaldskravi. Harafturat skulu tær sambært sakarkrøvunum rinda fyri at reinsa alla ta eitraðu jørðina í Vietnam.

Men fyribils kunnu leiðslurnar í Dow Chemical og hinum umleið 30 verksmiðjunum frøast um, at higartil hevur alt gingið eftir vild.

- Vit eru nøgdir við avgerðina hjá kærudómstólinum, sigur Chris Huntley, talsmaður hjá